# Føroyskar einskiljingar og børsskrásetingar

– hvat kunnu vit læra av royndum í grannalondum okkara?



Áhugavert tiltak við kjaki um einskiljing og børsskráseting.
Tiltakið verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 11. mai 2007 kl. 16.

Áhugað kunnu boða frá á **tf@trygging.fo** ella á tel: **345 503**.
Nøgdin av plássum er avmarkað, so teknið tykkum sum skjótast.

sansir.fo

### Skrá

| | |
|---|---|
| **16.00 – 16.10** | Gunnar í Liða, forstjóri<br>Vælkomin |
| **16.10 – 16.30** | Øyvind Birkeland, stjóri í DnB NOR<br>Hava Føroyar tørv á einum føroyskum banka – ella er nóg mikið við bankadeild, ið verður stýrd úr Keypmannahavn ella Reykjavík? |
| **16.35 – 16.55** | Helge Leiro Baastad, forstjóri fyri Gjensidige<br>Børsskráseting – fyrimunir og vansar |
| **17.00 – 17.30** | Orðaskifti |
| **17.30 – 18.15** | Lætt ábit |

Kongabrúgvin · Postboks 329 · 110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari



# Fíggjarstjóri til Postverk Føroya

### Uppgávan
Postverk Føroya er í gongd við eina nýggja, spennandi og avbjóðandi framtíð, nú stovnurin er umskipaður til partafelag. Postverk Føroya søkir í tí sambandi eftir fíggjarstjóra, sum fær uppgávuna at mynda og samskipa fíggjarstýring felagsins úr enda í annan. Afturat fíggjarstýring fær fíggjarstjórin ábyrgd av innkeypi, løn og giro. Starvið sum fíggjarstjóri er beinleiðis komið av strategisku menningini, ið er sett í verk á Postverki Føroya.

Fíggjarstjórin fær stóra ávirkan á, hvussu felagið verður ment. Fyrsta avbjóðingin er at endurskoða alla mannagongd felagsins innan fíggjarstýring, her íløgu- og likviditetsstýring, effektivisering av bókhaldsviðurskiftum, umsiting av starvsfólkum, fíggjarætlanararbeiðið, búskaparfrágreiðingar og -skipanir eru sera umráðandi. Fíggjarstjórin tekur virknan lut í stjórn felagsins og fær tískil beinleiðis ávirkan á tær framtíðarætlanir, ið verða lagdar fyri fyritøkuna.

### Førleiki
Tú hevur í minsta lagi 5 ára starvsroyndir, og tað er ein treyt, at tú kanst vísa á úrslit innan fíggjarstýring og leiðslu, umframt at tú hevur innlit í lóggávu og aðalkrøv innan bókhald. Titt eyðkenni er, at tú røkkur tey mál, tú setur tær. Tú dugir væl at fáast við fólk og hevur sostatt lætt við at skapa støðugt samband við starvsfelagar umframt viðskiftafólk og -stovnar.

Hjá fíggjarstjóranum er avgerandi, at skil er á øllum lutum, so búskapur felagsins verður trygt skipaður. Tað er eisini ein treyt, at tú hevur neyðugt yvirlit, so tú fært verið við í leiðslu felagsins sum proaktivur partnari á jøvnum føti við tínar leiðslufelagar.

Umframt hóskandi útbúgving hevur tú royndir við at umskipa mannagongd yvirhøvur, og tað er ein treyt, at tú hevur greiða fatan av møguleikunum innan KT. Postverk Føroya brúkar KT-skipanina Navision til eitt nú fíggjarstýring.

### Postverk Føroya bjóðar tær
eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv við nýmótans leiðsluhátti. Hetta er eitt krevjandi starv, og tí bjóða vit tær eina góða løn í samsvari við førleika og royndir.

### Umsókn
Áhugað eru vælkomin at ringja til Sofus Clementsen, stjóra, á **telefon 23 61 31** og fáa meiri at vita um starvið. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsókn við CV skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin tann 7. mai 2007** og verður send til:

**P/F Postverk Føroya**
Att.: Sofus Clementsen
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
**ella um teldupostin til:** sofus@postverk.fo

***Stutt um Postverk Føroya***
*280 fólk arbeiða hjá P/F Postverki Føroya. Tann 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alla útbering felagsins, er á Óðinshædd í Havn. Saman við samstarvsfeløgum veitir Postverk Føroya bestu flutningstænastu og dygdarbestu viðgerð úti og heima.*

Postverk Føroya
– okkara samskiftisfyritøka

**postverk.fo**